Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøtersgøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
26. januar 2026

Okkara j.nr.
26/00657

Málsviðgeri
BR

Tygara j.nr.
25/08929

Hoyringarsvar til uppskot um broytingar í dagstovnalógini

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, hereftir KAF, hevur hesar viðmerkingar til broytingaruppskotið:

Til § 8. Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving. Leiðari fyri sjálvsognarstovn verður settur av nevndini fyri stovnin. Starvið skal lýsast leyst alment.

Stk 4. Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi vera 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi.

Viðmerking til § 8, stk. 1, og stk. 4

KAF heldur, at ásetingin í § 8, stk. 1, í lógini um kravið fyri at gerast dagstovaleiðari (at leiðarin skal verða námsfrøðingur) eigur at verða endurskoðað og gjørd meira nútíðarhóskandi, soleiðis at starvsfólk við øðrum hóskandi útbúgvingum kunnu setast sum dagstovnaleiðarar.

Eisini ásetingin um starvsfólkabýti sbrt. § 8, stk 4, á dagstovnaøkinum eigur at verða dagførd – og gjørd meira nútíðarhóskandi. Fáir dagstovnar hava livað upp til ásetingina í § 8, stk. 4, ta tíðina, ið núverandi dagstovnalóg hevur verið galdandi, og tí er tað undranarvert ikki at endurskoða hesa áseting.

KAF heldur, at kommunalu arbeiðsgevararnir hava førleika sjálvir til at seta bæði skikkað faklig starvsfólk og dagstovnaleiðarar, ið kunnu tryggja fakligheitina í tilboðnum. Eftir at fleiri kommunur hava vent sær til KAF við fyrispurningi um at løna ávísum fakbólkum, ið arbeiða á

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

dagstovnaøkinum eftir sáttmálanum við Føroya Pedagogfelag sum pedagogar á dagstovni, viðgjørdi KAF málið í nevndini um ársskiftið 2021/2022.

Nevndin í KAF hevur samtykt, at fyrisitingin kann vegleiða kommununum í at løna ávísum fakbólkum, sum arbeiða á kommunalu dagstovnunum, harímillum lærarum o.ø., eftir sáttmála okkara við Føroya Pedagogfelag eins og námsfrøðingar á dagstovnum; fyribils til 30. juni 2027.

Orsøkin handan hesa avgerð er, at starvsfólkatrot rakar kommunala, almenna og privata geiran, og kappast verður um starvsfólkini. Útlit eru heldur ikki fyri í nærmastu framtíð, at tørvurin á námsfrøðingum verður nøktaður. Aðrir fakbólkar starvast í dag á dagstovnaøkinum; talan er um starvsfólk við viðkomandi miðallongum útbúgvingum, sum við síni útbúgvingarligu bakgrund og royndum eru við til at tryggja eina hóskandi fakligheit á økinum. Kommunurnar vilja sera fegnar varðveita hesi starvsfólk á dagstovnaøkinum bæði fyri at varðveita fakligheitina og fyri at skapa støðugar umstøður í starvsfólkahópinum, við tað at ásannast má, at trupult er at rekruttera námsfrøðingar til kommunala dagstovnaøkið. KAF meinar, at útbúgvingarførleikin hjá hesum starvsfólkum má umhugsast at telja meira enn tann hjá einum ófaklærdum hjálparfólki.

KAF heldur, at tað eru fleiri starvsbólkar við ymiskari útbúgvingarligari bakgrund, sum kunnu arbeiða á kommunalu dagstovnunum – og harvið økja um fakligheitina á stovnunum. Bara við at hyggja at limaskaranum í Føroya Pedagogfelagi síggja vit, at felagið í dag rúmar fleiri starvsbólkum enn námsfrøðingum og hjálparfólkum uttan útbúgving. KAF og Pedagogfelagið gjørdu, tá útbúgvingin til námsfrøðiligar hjálparar varð sett í verk á Heilsuskúla Føroya, avtalu um, hvussu ein nýggj flokking til námsfrøðiligar hjálparar skuldi ásetast í mun til støðið á útbúgvingini. Hóast hesa nýggju útbúgving og nýggja førleikan á økinum varð onki avtalað um, hvussu hetta skuldi ávirka vektingina av starvsfólkasamansetingini sambært § 8, stk. 4, í dagstovnalógini. Talan er um ein starvsfólkabólk, sum er útbúgvin til at arbeiða á dagstovnaøkinum, men ongin avgerð varð tikin um, hvussu hetta ávirkaði fakligheitina á dagstovnaøkinum og vektingina í mun til starvsfólkasamansetingina á økinum. KAF meinar, at BUMR tá átti at havt gjørt sær nakrar tankar um, hvussu nýggja útbúgvingin skuldi ávirka fakligu starvsfólkasamansetingina sambært dagstovnalógini § 8, stk. 4.

Aftrat omanfyristandandi eru vit vitandi um, at Fróðskaparsetrið (við góðkenning frá BUMR) í næstum fer at bjóða út eina námsfrøðiliga útbúgving, “diplom í námsfrøði”, sum eisini er ætlað til dagstovnaøkið. Talan er aftur her um ein nýggjan starvsbólk, sum støða má takast til, hvussu normeringin skal telja við í starvsfólkasamansetingini á dagstovnaøkinum vísandi til § 8, stk. 4. KAF heitir tí á BUMR um at taka støðu til hesi viðurskifti – og um at endurskoða ásetingina í § 8, stk. 4. Her verður hugsað um vektingina av øktu førleikunum, bæði

námsfrøðiligu hjálparunum, námsfrøðingum við diplomútbúgving – og hjá øðrum starvsbólkum við sambærligum útbúgvingum, sum kunnu økja um fakligheitina á dagstovnaøkinum. Við ikki at taka støðu til vektingina av starvsfólkasamansetingini verður mismunur gjørdur á starvsfólkabólkunum, sum fakliga rúmast í sáttmála okkara við Føroya Pedagogfelag.

Uppskot um nýggja áseting "§ 8, stk. 4: Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 1/3 til námsfrøðingatímar, 1/3 til aðrar námsfrøðiligar útbúgvingar og aðrar viðkomandi útbúgvingar á sama støði, sum námsfrøðingar og 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi".

Til § 3, *stk. 2.* Dagstovnar sambært hesi lóg eru hesi námsfrøðiligu tilboð: nr. 1. Dagrøkt og vøggustovur til børn í aldrinum 6 mánaðir til 35 mánaðir. nr. 2. Barnagarðar til børn í aldrinum 36 mánaðir til byrjan av skúlagongd. nr. 3. Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.

Stk. 3. Kommunan kann í serligum føri gera frávik í omanfyri standandi aldursbýti.

Stk. 4. Kommunan kann sambært hesi lóg skipa samansett tilboð til børn í aldrinum 6 mánaðir til og við 2. flokk."

Viðmerking til § 3, stk. 2.

Við uppskotinum verður í stk. 2, nr. 1, ásett, at dagrøkt og vøggustovur eru til børn í aldrinum 6 mánaðir til 35 mánaðir. Samstundis verður í stk. 3 ásett, at kommunan í serligum føri kann gera frávik í omanfyri standandi aldursbýti.

Praksis hjá kommunum hevur verið, at børn í fyrsta lagi kunnu fáa dagstovnatilboð frá tí, at barsilstíðarskeiðið er um at vera liðugt, tað vil siga, tá barnið er um 10-11 mánaðir. Ein vandi við at áseta aldursbýtið niður til 6 mánaðir, og at frávik bert kann verða gjørt í serligum førum, er, at foreldur kunnu væntast at krevja dagstovnapláss longu frá tí, at barnið er 6 mánaðir.

Í serligu viðmerkingunum verður dentur lagdur á, at aldursbýtið millum dagrøkt/vøggustovu og barnagarð er vegleiðandi aldursbýti, og at kommunurnar kunnu víkja frá hesum, tá talan er um menningarlig atlit hjá barninum, praktiskar ella skipanarligar orsøkir. Sostatt er tað

bert skiftið millum vøggustovu/dagrøkt og barnagarð, ið er vegleiðandi, meðan aldurin frá 6 mánaðum er fastlagdur.

Hetta brýtur við ta praksis, at kommunurnar kunnu áseta í upptøkureglugerð, at dagstovnatilboð verður veitt børnum í aldrinum frá t.d. 10 mánaðum til skúlagongd.

Verður framyvir kravt av kommunum at veita dagstovnatilboð til børn frá 6 mánaða aldri, fer tað at hava víðfevnda ávirkan á dagstovnaøkið og á dagstovnatilboðini á stovnunum. Bæði viðvíkjandi hølisumstøðum og starvsfólkatørvi og námsfrøðiliga tilboðnum á stovunum, ið broytist munandi.

Heldur átti tað at komið undir § 3, stk. 3, sum frávik, um barn, sum er 6 mánaðir, hevur tørv á vøggustovuplássi.

Til § 3 a. Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, hava opið gerandisdagar í dagtímunum. Frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum. Kommunan ásetur nærri upplatingartíðir fyri dagstovnarnar.

Stk. 2. Kommunan kann uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 áseta, at dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, heilt ella partvíst ikki hava opið ávísar dagar og í skúlafrítíðum, tó í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur.

Kommunan kann samskipa tilboð í frítíðum.

Viðmerking til § 3 a, stk. 2

Við uppskotinum verður ásett, at stovnar kunnu hava afturlatið í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið og í mesta lagi 4 vikur samanhangandi.

Uppskotið kann leggja upp til, at stovnar ikki kunnu vera stongdir meira enn 3 vikur samanhangandi um summarið, fyri at fáa restina av árinum at ganga upp viðvíkjandi frídøgum millum jól og nýggjár, umframt ráðleggingardagar.

Uppskotið leggur tískil upp til, at børn í dagstovnaaldri í mesta lagi kunnu fáa 3 vikur samanhangandi frítíð um summarið, sum er óheppið.

Kommunurnar eiga sjálvar at meta um tørvin á, nær dagstovnavirksemið er opið, og nær tað er stongt. Hetta eigur ikki at vera ásett í lógini.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Til § 3, stk. 2, nr. 2. Barnagarðar til børn í aldrinum 36 mánaðir til byrjan av skúlagongd.
nr. 3. Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.

Viðmerking til § 3, stk. 2, nr. 2, og nr. 3
Hvussu skal byrjan av skúlagongd skiljast, tá fleiri kommunur hava forskúla? Vit leggja upp til, at hetta verður orðað greiðari.

Til § 5. Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.
Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð.
Stk. 3. Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannaverkið, ið tekur avgerð.

Viðmerking til § 5
Tá talan er um ábyrgdarbýtið millum land og kommunu, er tað ikki rætt, at tað ikki verður hugt nærri at § 5 í Løgtingslógini um dagstovnar og dagrøkt stk. 3, sum verður verandi óbroytt í hesum uppskotinum.

Tað er ikki rætt, at Almannaverkið framhaldandi skal taka avgerð, hvørt eitt tilboð skal veitast sambært hesi lóg. Hetta eigur at verða broytt til, at Føroya Kærustovnur sum uttanveltaður stovnur tekur avgerð í slíkum ivamálum.

Til § 5 a. Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum.

Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.

Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv.

Viðmerking til broytingar í § 5 a

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Við uppskotinum verður skilnaður gjørdur millum, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita námsfrøðiliga ráðgeving og landið (Sernám) sernámsfrøðiliga ráðgeving. Her verður roynt at skilja millum ábyrgdaruppgávurnar hjá báðum, og er tað sera gott.

Tó verður undir fíggjarligar avleiðingar (2.1) víst á, at Sernám longu í dag røkir hesa uppgávu, og at uppskotið ongar væntaðar eyka útreiðslur hevur við sær fyri Sernám. Hesum ivast vit stórliga í, við tað at tað longu í dag eru langar bíðitíðir eftir tænastum frá Sernámi.

Skal Sernám røkja hesa uppgávu til fulnar, uttan drúgvar bíðitíðir fyri børn, foreldur og stovnar, má roknast við, at tørvur verður á munandi størri arbeiðsorku hjá Sernámi til at kunna veita hesa sernámsfrøðiligu ráðgeving til dagstovnaøkið.

Vegna Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Per Martin Gregersen, formaður